Anders Fogh Rasmussen á vitjan:

# Ein nýggj byrjan

**– Føroyingar eiga alla avgerð sjálvir um, hvussu tað verður við loysingini, men nú fara vit at tosa um, hvussu vit kunnu moderniserað ríkisfelagsskapin**



*Løgmaður við fylgi tók ímóti danska forsætisráðharranum*

VITJAN
*Heri á Rógvi*

Tað var ein fegin Anders Fogh Rasmussen, sum kom til høvuðsstaðin fyrrapartin mánamorgunin.

– Eg havi tær bestu vónir, at vit fáa góðar samrøður um Føroyar og framtíðina hjá ríkisfelagsskapinum, segði Anders Fogh Rasmussen á Boðanesi, tá ið hann júst var lendur við tyrlu úr Vágum.

Løgmaður var komin fyri at taka ímóti, og tað var eisini ein stórsmílandi og fryntligur danskur forsætisráðharri, sum møtti løgmanni og hinum, sum vóru komin at fylgja við, tá ovasti danski politikarin kom til føroyska høvuðsstaðnum.

– Eg vóni, at hetta verður ein nýggj byrjan. Eg haldi tónin hevur verið nakað harður, men hetta kann vónandi gerast betri. Eg møti upp við tí tanka, at tað verður føroyska fólkið, sum taka avgerðirnar viðvíkjandi framtíðarstøðuni hjá føroyingum í ríkisfelagsskapinum, segði Anders Fogh.

Hann vildi ikki siga nakað konkret um, hvat tað verður tosað um við løgmann og hvørji mál teir fara at taka upp.

Hann segði, at túrurin hevði verið nakað turbolentur, men hann kom til Føroya, og tað var hann glaður fyri.

– Eg vóni ikki, at lendingin verður eyðkenni við samráðingunum millum Føroyar og Danmark.



*Anders Fogh Rasmussen svaraði eisini spurningum frá forvitnum fjølmiðlafólki*

# Betri fortreytir fyri íløgum

**Ein nýggj lóg um skatting av kapitalvinningi fer at merkja munandi broytingar fyri tey, ið gera íløgur í virðisbrøv. Skattingin verður gjørd munandi einfaldari.**
**–Hetta vil so avgjørt økja um hugin hjá vanligum fólki at gera íløgur í annað enn innlán, metir Petur Holm, stjóri fyri Kaupthing Føroyar**



*Tað verður munandi meira hugaligt at gera íløgur í annað enn innlán í framtíðini, tá skattatreytirnar heilt verða umskipaðar*

BÚSKAPUR
*Heri á Rógvi*

Tey flestu av okkum eiga pengar á bók hjá einum peningastovni. Hesin peningurin hevur ein ávísan vøkstur orsakað av rentuni, sum peningastovnurin hevur ásett. Tað er sjálvandi rættiliga ymiskt, hvussu nógv ein konto fær í rentu. Pengarnir, sum vit hava innistandandi á konto verður rópt fyri innlán, og er hetta í Føroyum tann nógv mest vanligi hátturin, ið fólk gera íløgur.

Rentan, ið vit fáa frá peningastovninum, verður eisini skattað, soleiðis at tað ikki altíð er líka lætt at síggja, hvussu nógv tær innistandandi krónurnar geva í avkasti.

Ein broyting í lógini um skatting av kapitalvinningi vil nú gera tað munandi lættari at gera íløgurnar í annað enn innlán.

### Minni skattur

– Fyri einstaklingar hevur leingi verið gjørdur greiður munur millum skatting av innláni í føroyskum peningastovnum og íløgur í virðisbrøv uttanlands. Í høvuðsheitum hevur vinningur fyri virðisbrævaíløgur verið skattaður sum vanlig skattskyldug inntøka, sum í flestu førum merkir 50%, meðan rentuvinningur frá føroyskum innlánum hevur verið skattaður við 35%. Sambært løgtingslóg um skatting av kapitalvinningi verða íløgur í virðisbrøv nú skattaðar eins og innlán, og harafturat eru broytingar gjørdar í skattagrundarlagnum, sum hava aðrar fyrimunir við sær, skrivar Kaupthing Føroyar á heimasíðuni hjá fyritøkuni.

Samstundis verður tað eisini broytt, soleiðis at um ein fyritøkan hevur eitt tap, so kann hetta tapið avskrivast næstu fimm árini.

Tey, sum fara at fáa gleði av hesum er tey, sum eiga og fara at keypa sær partabrøv og onnur virðisbrøv. Eisini fólk, ið eiga lánsbrøv kunnu gleða seg til eina munandi bata.

Petur Holm, stjóri fyri Kauphting Føroyar væntar eisini, at fleiri føroyingar fara at gera íløgur.

– Vit hava í seinastu tíðina lagt til merkis, at áhugin fyri at gera íløgum er vaksin í Føroyum. Nýggju lógarásetigarnar vilja so avgjørt eisini merkja ein størra áhuga fyri at gera íløgur, sigur Petur Holm.

Hann metir eitt nú donsk lánsbrøv fara at vera væl umtókt millum føroyskar íløgutakarar, men tað sjálvsagt ógvuliga ymiskt, alt eftir, hvussu fíggjarstøðan og endamálið eru.

Hann sigur víðari, at partafeløg framvegis gjalda tey somu 20% í skatti, eins og áður.

– Nýggja kapitalvinningsskattalógin hevur virknað fyri kapitalvinning og -tap, sum eru staðfest 16. november 2001 ella seinni.

Fyri partabrøv, íløguprógv og líknandi virðisbrøv eins og umbýtilig lánsbrøv ella serlig rættindi, ið hava tilknýti til hesi virðisbrøv, eru ásettar serligar skiftisreglur. Orsøkin til hesar skiftisreglur er at finna í gomlu virðisbrævaskattalógini, sum fór úr gildi, samstundis sum nýggja lógin kom í gildi. Eftir gomlu lógini gjørdist kursvinningur fyri vanligar íløgur í nevndu virðisbrøv skattafríur, um vinningurin bleiv staðfestur 3 ár ella meira eftir, at virðisbrøvini vórðu keypt, staðfestir Petur Holm.

# Oyggjarnar klára seg best

**Sambært danskari kanning, so klára vinnulívið í Føroyum, Grønlandi og Bornholm seg betri enn restin av danska vinnulívinum**

VINNULÍV
*Heri á Rógvi*

Købmandstandesn OplysningsBereau A/S hevur gjørt eina kanning, har teir samanbera vinnulívið ymsastaðni í danska ríkinum. Millum niðurstøðurnar í frágreiðingini er ein, sum kanska kann tykjast rættiliga spennandi fyri føroysk vinnulív.

Tí, sambært kanningi, so klárar vinnulívið í Føroyum, Grønlandi og Bornholm seg so mikið væl, at tað er at meta sum besta vinnulívsúrslitini í danska kongaríkinum.

Tá tað er sagt, so sigur kanningin eisini, at hvør tíggjunda fyritøka í Føroyum, Grønlandi og Bornholm fer beinaleið móti tvingsilsavtøku.

Købmandstandesn OplysningsBereau A/S hevur gjørt kanningina og meira fæst at vita frá teimum.



# Vesturvón farin eystureftir

**Teir fyrstu langfaratrolararnir eru farnir eystur eftir í ár. Vesturvón fór sunnudagin, og undan honum er Sundaberg farin**



FISKIVINNA
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Vesturvón fór sunnudagin fyrsta túrin í ár. Leiðin gongur í norskan sjógv.

Ólavur Petersen, reiðari, sigur, at teir hava fngið loyvi at byrja at fiska í norskum sjógvi í Barentshavinum, hóast kvotan enn ikki er býtt millum skipini.

Tað eru fimm føroysk skip, sum fiska av kvotuni í Barentshavinum. Tey eru Akraberg, Enniberg, Skálaberg, Sundaberg og Vesturvón. Ólavur Petersen sigur seg hava frætt, at Sundaberg er komin á fiskileið, men at hann einki veit at siga um fiskiskapin hjá teimum.

Árið í fjør var heilt hampiligt hjá Vestuvón, letur reiðarin at. Hann vil ikki siga, hvussu hampiligt tað var, uttan at hann fiskaði fyri nakrar milliónir.

Tað verður tó ov lítið bara at dúva upp á tað, sum í Barentshavinum fæst við samráðingum, sigur Ólavur Petersen. Umframt norsku kvotuna, hava teir eisini ta russisku, sum teir plaga at sleppa at fiska burturav í norskum sjógvi.

Men neyðugt verður eisini við ørðum, sigur reiðarin. Eitt nú ætla teir at royna at sleppa at keypa sær kvotu frá russum, sum teir fyrr hava gjørt.

Eisini plagar Vesturvón at vera onkran túr vestanfyri eftir svartkalva, og tað ætla teir eisini at sleppa í ár, sigur Ólavur Petersen. Umsókn er send, sigur hann.

Teir vóru 35 mans við Vesturvón, nú hann fór fyrsta túrin í ár.

Annars eigur partafelagið Vesturvón eisini fýra onnur skip. Tað eru tvey ísfiskapør. Akraborg og Varðborg og Akranes og Dragasund, sum felagið keypti stutt fyri jól.

Teir hava landað í Sørvági fyrstu ferð í ár, sigur Ólavur Petersen. Akraborg og Varðborg høvdu 1.500 kassar, meðan Akranes og Dragasund høvdu 2.000 kassar av upsa. Prísurin liggur millum fimm og hálvasættu krónu fyri kilog, sigur Ólavur Petersen.

Vesturvón eigur eisini flakavirkið í Sørvági, sum er leigað út til Vestís Seafood. Ólavur Petersen sigur, at har er arbeiði hvønn dag. Tað arbeiða eini 12 fólk saltfisk á virkinum, sigur hann.

# Avtalan um oljuna ikki broytt

FORSÆTISRÁÐHARRAVITJAN
*Jan Müller*

Áðrenn danski forsætisráðharrin Anders Fogh Rasmussen kom á almenna vitjan í Føroyum mánadagin spurdu vit løgmann, um spurningurin um ognarrættin til ráevnini í undirgrundini fór at verða tikin á fundunum teirra millum.

Løgmaður sigur avgjørdur, at hetta málið er avgreitt bæði frá føroyskari og danskari síðu. -Tað málið verður ikki reist frá føroyskari síðu. Verður tað reist av fjølmiðlunum fari eg bara at endurtaka innihaldið í avtaluni frá 92, sum allir partar eru samdir um og sum eisini hevur verið staðfest fleiri ferðir.

Seinastu tíðina hevur varaløgmaður, Høgni Hoydal í lýsingum og greinum í bløðunum reist spurningin og víst á, at soleingi føroyingar ikki hava skjøti til sítt egna land ber til hjá dønum at sáa iva um virði í avtaluni frá 1992. Til tað sigur løgmaður, at hann tekur ikki undir við Høgna Hoydal, tá tað snýr seg um ráevnini í undirgrundini.

- Tað málið varð avgreitt í desember 92. Sjálvt um man bæði frá danskari og føroyskari síðu hevur roynt at seta spurnartekin við avtaluna, so hevur man eisini frá danskari síðu entá í fólkatinginum fingið staðfest, at har er einki at gera. Tann avtalan hevur fult gildi.

Løgmaður vísir á, at tá formaður Tjóðveldisfloksins umrøður hetta málið, so tosar hann um at fáa skjøti til landið, og tað er nakað annað. - Skjøtið fáa vit ikki, fyrr enn vit taka fullan suverenitet. Tað er galdandi í hesum og øllum øðrum málum. Vit hava gjørt avtalu við donsku stjórnina, sum gevur okkum ognarrætt til ráevnini, og tað er staðfest allan vegin, at vit hava henda rætt til ráevnini í undirgrundini. Tað eru ikki tvær meiningar um tað.

# Oljan týdning fyri sjálvstýristilgongd

VALIÐ OG OLJA
*Jan Müller*

Nú valið nærkast og spurningurin um oljufund verða tengt at sjálvstýristilgongdini spurdu vit Anfinn Kallsberg, løgmann, í hvussu stóran mun hann metir at ein møgulig oljuvinna verður ein partur av valstríðnum til løgtingið!

- Olja og oljuvinnu er eitt bein aftrat í búskapinum. Og tað er greitt, at ein búskaparlig tillaging í Føroyum verður rættiliga nógv bundin av, hvussu búskaparligi útviklingurin verður. Nógv olja merkir, at tað verður kanska skjótari at fáa gjørt tær tillagingar í búskapinum, soleiðis at vit hava yvirtikið tey flestu av hesum økjunum, sum eisini krevja fíggjarliga orku.



- *Og verður eingin olja?*

- Ja so gongur tað nakað seinni. 2012 er eitt mál. Tað kann fara báðar vegir.

# Fogh hitti løgtingslimir

FORSÆTISRÁÐHARRAVITJAN
*Jan Müller*

Í gjár kom nýggi danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen á vitjan í Føroyum. Her skuldi hann hitta løgmann og landsstýrið umframt umboð fyri allar flokkar á tingi. Anfinn Kallsberg heldur tað er skilagott av forsætisráðharranum at koma til Føroya so tíðliga tilber, uttan mun til um tað er val ella ikki. Hann fer neyvan at leggja seg út í eitt føroyskt valstríð heldur løgmaður.

Ætlanin var at danski forsætisráðharrin bara skuldi hitta løgmann, umboð fyri landsstýrið og Sambandsflokkin, sum er samstarvsflokkur hjá Vinstra. Men eftir ynski frá eitt nú Javnaðarflokkinum varð tað broytt, soleiðis at fundur skuldi vera á Hotel Hafnia í gjár klokkan 16, har Anders Fogh Rasmussen skuldi hitta umboð fyri allar flokkar á tingi. Løgmaður sigur í eini viðmerking, at hetta er ein skilagóð broyting í skránni, tí tað gevur eina betri javnvág í. Hann sigur seg fult út kunna taka undir við hesum. Tað er danski forsætisráðharrin, sum sjálvur hevur valt at hitta umboð fyri allar flokkar. Løgmaður sigur, at hetta er eisini í tráð við tað Poul Nyrup Rasmussen gjørdi á sinni. Og verður hetta helst gjørt fyri, at forsætisráðharrin ikki skal verða lagdur undir at leggja seg út í føroysk viðurskifti.